# Tað stendur púrasta javnt



Tvørakvinnur vóru sera sannførandi, tá tær rætt og slætt vundu burtur úr Drátti, sum annars plagar at standa seg heilt væl á Giljanesi

**Oddastríðið í bestu kvinnudeildini blotnaði ikki pettið um vikuskiftið, og enn er einki avgjørt millum tey trý fremstu liðini**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast Dráttur hevur gjørt onkran vørrin í ár, so hava avrikini seinastu vikurnar kortini ikki bent á, at tær kunnu fara at seta kílar ímillum tey trý ovastu liðini.

Spennningurin var annars stórur, tá TB kom á vitjan um vikuskiftið, men tað skuldi skjótt vísa seg, at her var ikki stórvegis at gera hjá heimaliðnum.

Føroyameistararnir úr TB hava kanska ikki vunnið heilt so nógv, sum tær kundu hugsað sær í ár, og ikki minst hava tapini fyri ÍF tikið fast, men í aðrar mátar tykist liðið í løtuni vera besta boðið um ein komandi meistara. Fyrstu tvey settini rætt og slætt hólvaðu tær annars heimasterka Drátt ígjøgnum, og tó at tað í triðja settinum var um reppið, at Dráttur fekk argað eitt sindur, so nart hetta ikki við heildarmetingina av dystinum.

## Hini fylgja við

Hóast bragdliga avrikið hjá TB í Vágunum, so skerst ikki burtur, at tað eisini eru onnur lið, sum vilja tosa við um, hvar meistaraskapurin skal fara.

Fyrst og fremst er tað kanska ÍF, sum við tveimum sigrum á meistarunum leggja trýst á, og hjá teimum var so eingin slingur í valsinum, tá tær høvdu vitjan av KÍF. Hóast settmunurin ikki var so ræðandi stórur í dystinum, so var ongan tíð ivi um, at ÍF átti sterkara liðið, og uttan at tær nakran tíð spentu seg heilt út, vunnu tær ein tryggan 3-0 sigur.

Og ivi var heldur ikki í Klaksvík, har gamli føroyski flogbóltsklassikarin var á skránni. Tað er tó so sum so við spenninginum í hesum fyri tíðina, og tað var heldur ikki tað stóra, sum Fleyr fekk gjørt sunnudagin. Heldur ikki hóast tað langt ífrá var eitt Mjølnir í sterkastu uppstilling, sum var á vøllinum.

Spurningur er so, hvussu tað fer at tørna út, nú farast skal undir endaspælið í flgogbóltskappingini. Ivaleyst er tað framvegis so, at TB eru favorittar at endurvinna FM, men tað er so heldur eingin ivi um, at kappingin í ár fer at verða bæði harðari og breiðari, enn hon var í fjør. Alt bendir í øllum førum á, at tað verða innanhýsis dystirnir millum TB, ÍF og Mjølnir, sum verða avgerandi fyri, hvussu leikur fer, tó at Dráttur kanska onkun tíð fer at hava eitt orð at siga í so máta. Fyri Fleyr og KÍF verður tað fyrst og fremst ein spurningur um at sleppa undan niðurflytingini, og eisini her verða tað fyrst og fremst teir báðir innanhýsis dystirnir, sum fara at greiða tann spurningin.

# So fekk ÍF mótstøðu

**Eftir 21 vunnin sett á rað fingu fuglfirðingar ein hvøkk leygardagin, og tó at teir vunnu dystin á Fram, so kann avrikið hjá havnarmonnunum geva hinum liðunum orsøk til eitt sindur av optimismu**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Fuglfirðingar vunnu sum væntað oddadystin móti Fram, men tað stóð nógv meira á, enn tað hevur gjørt í nøkrum øðrum dysti hjá oddaliðnum*

Í seinasta dystinum í grundspælinum fekk ÍF loksins mótstøðu.

At teir als ikki hava fingið nakra mótstøðu undanfarnu sjey umførini, er kanska at taka dekan ov rívan til. Men í øllum førum hevur hon ongan tíð verið somikið treisk og hørð sum tann, ið Fram gav teimum leygardagin.

Fuglfirðingar vóru annars nakað skerdir undan dystinum, tí ein av avgjørt sterkastu leikarunum, Rúni Weihe, sat uttan fyri við skaða. Rúni hevur sum kunnugt áður spælt við Fram, og tað tóktist eisini so, at havnarmenninir veruliga vóru uppsettir at vísa, at teir eisini kundu standa seg sjálvir.

Frá fyrsta bóltinum royndu teir at leggja trýst á fuglfiriðingarnar, og eina løtu eydnaðist teimum eisini verluliga at senda oddaliðið eftir hæli. Fuglfirðingar fótaðu sær tó somikið væl, at teir fingu skapt spenning um fyrsta settið, sum Fram tó tók, men næstu ferð vóru fuglfirðingarnir so omaná.

Fram hevði tó ikki hug at geva seg. Teir vunnu triðja, men taptu fjórða sett,

soleiðis at neyðugt gjørdist við avgerandi javnbrótaranum, men her var orkan uppi. Kanska eisini tí sálarliga barlastin hjá ÍF við sjey sigrum á rað hevur verið tað pettið betri enn hjá Fram. Í øllum førum vunnu teir hetta seinasta hampuliga trygt, og halda soleiðis fast um fulla stigatalið.

## Mjølnir fær trúnna aftur

At Fram tapti viðførdi so eisini, at klaksvíkingar fingu møguleika at koma upp á næst fremsta plássið, og hetta hendi uttan stórvegis hóvasták. Fleyr var á vitjan, og her var ongan tíð nakar sum helst spenningur. Samanlagt vunnu havnarmenninir bert fatur á 35 bóltum, og tað sigur helst tað, sum sigast skal, um yvirvágina, sum Mjølnir hevði.

Eitt er, at tað hjá Mjølnir mundi kennast gott, at teir soleiðis skræddu seg leysar frá Fram. Annað - og ikki minni fløvandi – mundi vera spennandi dysturin á Kambsdali. Hann vísti í øllum førum, at við rætta hugburðinum, so ber til at skala fuglfirðingarnar nakað, og hóast teir vónandi fáa Rúna inn aftur á liðið nakað skjótt, so er einki at ivast í, at hetta hevur skapt eitt lítið vet av spenningi aftur í kappinga, sum annars longu hevur tóktst avgjørd.



# Vágatunnilin fer at skapa møguleikar



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður letur fyrsta undirsjóvartunnilin í Føroyum upp fyri almennari ferðslu*

*Mynd Jens K. Vang.*

**Tunnilin fer at skapa møguleikar og fleksibilitet. Vinnulív og borgarar hvør í sínum lagi kunnu leggja síni egnu ferðaviðurskifti til rættis. Hann verður ein avbjóðing fyri vinnulívið í Vágum, bæði tí vinnan í størri mun enn áður kann bjóða seg fram á restini av meginøkinum, og tí vinnan má vænta at fáa størri kapping. Hetta er ein søguligur dagur. Landi og fólki at frama segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður tá Vágatunnilin alment varð latin upp 10. desember. Vit prenta hesa søguligu røðu**

VÁGATUNNILIN
*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður*

Menniskjan hevur altíð livað undir náttúruskaptum fortreytum, sum av-marka virkisfrælsið. Firðir og sund, herðar og fjøll hava frá gamlari tíð virkað forðandi fyri samskifti millum fólk.

Mannalyndið er tó háttað so, at flestu taka forðingarnar sum eina avbjóðing.

Tí hava okkara forfedrar búleikast á hesum oyggjum. Hava ferðast millum bygda, treiskast móti veðri og vindi. Hava livað og virkað, hóast mangan baldrut og fátæksligt.

Henda íborna drívmegin er grundarlagið undir hugflogi og virkisfýsni, sum hevur lagt lunnar undir verkætlanum, sum broyta náttúrugivnu fortreytirnar, minka um forðingarnar og lætta um møguleikarnar fyri samferðslu og samskifti. Og tað eru ótald dømi eru um hetta.

Her á landi er útbyggingin av vega- og samferðslunetinum í sjálvum sær prógv um, at vit hava sæð møguleikarnar heldur enn bara vansarnar.

Hóast vit soleiðis áhaldandi hava betrað um samferðslumøguleikarnar farnu ártíggini, so vóru flestu fyri mansaldri síðani samd um, at fast samband um Vestmannasund var so stórur biti fyri landsbúskapin, at hetta í minsta lagi mátti skýrast sum luksusprojekt. Kanska var hesin hugburður partur av vanahugsan, men nakrir vóru, sum hildu á og fleiri ymiskar verkætlanir sóu dagsins ljós undan hesari.

Nú vit eru savnað her, eiga vit at ásanna, at veruleikin gjørdist øðrvísi og ikki minst betri. Nú opna vit fyrsta undirsjóvarsamband í Føroyum - ein verkætlan, sum hevur víst seg at vera burðardygg, bæði tekniskt, umhvørvisliga, fíggjarliga og samfelagsbúskaparliga.

Tað gekk tó rúm tíð frá, at hugskotið um fast samband um Vestmannasund spratt í huganum á framskygdum fólkum, til vit í dag standa her við tunnilsmunnan, sum um skamma stund verður tikin alment í nýtslu.

- 1978: Vilhelm Nielsen og Haldor Hansen sáli hava uppskot heingibrúgv.
- 1979: Carl Bro ger uppskot fyri landsstðrið um brúgv
- 1978/1979: Mikkjal Helmsdal, sáli, sá og kunnaði seg um Vardøtunnilin. Bað Heina Olsen kanna møguleikar í Føroyum fyri undirsjóvartunlum, m.a. undir Vestmannasundi.
- 1980: Landsverkfrøðingurin ráddi løgmanni til at fara undir kanningar í Føroyum. Sama ár ger Landsverkfrøðingurin uppskot til ymiskar linjuføringar undir Vestmannasundi.
- 1986: Felagskommununi í Vágum biðir Anfinn Setberg gera uppskot til fast samband um Vestmannasund. Sama ár søkir felagskommunan landsstðrið um fígging.
- 1987: Felagskommunan í Vágum bíleggur undirsjóartunnil frá Selmer Furuholmen.
- 1988: Landsstðrið ger av, at prosjektábyrgd og – leiðsla skal liggja hjá LV. Sama árið verður farið undir arbeiðið uppá verkætlanina.
- 1989: Tá klárt var at skjóta fyrsta skotið, verður arbeiðið steðgað av fíggjarligum ávum.
- 1998: VMR ger í samstarvi við LV og SL costbenefit kanning av føstum sambandi um Vestmannasund. Notatið verður eisini sent Føroya Løgtingi.
- 1998 Okt.: Eykajáttanarlóg gevur landsstýrismanninum heimild at stovna partafelag, hvørs endamál skal vera at gera fast samband um Vestmannasund.
- 2000: Við løgtingslóg frá 8. februar 2000 um fast samband um Vestmannasund samtykkir Løgtingið, at farast skal undir verkætlanina, og fyrsta skot verður sprongt í 28. september 2000.
- 10. januar í ár varð so skotið ígjøgnum.
- 10. des. 2002: Fasta sambandið verður tikið í nýtslu.

Politiskt varð gjørt av at lata P/F standa fyri verkætlanini, og at rakstrarkostnaðurin og partur av íløgukostnaðinum skuldi fíggjast við bummgjaldi. Hesin hátturin at fremja verkætlanir er nýggjur í Føroyum, men er royndur við góðum úrsliti í grannalondunum.

Eg haldi, at tað hevur víst seg, at partafelagsformurin hevur virkað væl í hesari verkætlanini, ikki minst tá hugsað verður um fíggjarligu støðuna, tá avgjørt varð at fara undir verkætlanina.

Eg eri sannførdur um, at hevði partafelagsformurin ikki verið nýttur, hevði verið ivasamt, um farið varð undir verkætlanina tá. Undir øllum umstøðum høvdu vit ikki staðið her í dag, tí ikki var rúm fyri at játta meira enn 20 mió kr. árliga til verkætlanina fyrstu árini.

Eg fari vegna landsstýrið at takka einum samdum løgtingi fyri at árligu játtanin til partafelagið. Uttan hesa vælvild og stabilitet í løgtingsviðgerðini, so vóru møguleikarnir hjá P/F avmarkaðir, tá um fígging og útbjóðing ráddi og harvið verkætlanini allari.

Eg vil eisini nýta høvi at takka nevndini í P/F, Klæmint Weihe, form., Bergur í Garði, Oyvindur Brimnes, Jens Kári Vilhelm og Heri Hammer, fyri eitt dygdararbeiði. Tit hava í verki víst, at til ber at loysa uppgávur av hesum slagi í okkara fámenta landi. At tilber at fremja verkætlan á ótradionellan og skilagóðan hátt. Eisini eina tøkk til stjóran í felagnum, Dávur Reinert Hansen og hansara starvsfólkum.

Eisini vil eg takka Landsverkfrøðingsstovninum, sum hevur verið við til at fyrireika og góðkenna verkætlanina, og hevur havt tunnilseftirlitið um hendi.

Eisini skulu entreprenørur og undirentrepenørar og ráðgevarar hava tøkk fyri vælaarbeiði. Arbeiði, sum er liðugt meira enn hálvt ár áðrenn upprunaliga mett. Men einki arbeiði verður framt uttan verkamannin, handverkaran, sjaførar, arbeiðsformenn og hjálparfólk annars. Henda verkætlan, henda tunellin, er í síðsta enda tykkara verk. Uttan tykkara arbeiðs- og dugnasemi var einki at hátíðarhalda. Tí skal eg vegna landsstýrið eisini veita tykkum eina hjartans tøkk.

Eisini fari eg at takka Brunaumsjónini, Kommunurnar í Kvívík og Sandavági og annars eisini vágafólkum og øllum øðrum, eingin nevndur eingin gloymdur, fyri góðan stuðul.

Vit standa í dag við eitt vegamót, har vit siga farvæl við gomlu sjóvegis farleiðini um sundið, og bjóða nýggju farleiðini vælkomnari.

Eg rokni tó við, at vágafólk taka undir við mær, tá eg fari at senda eina serstaka tøkk til manningarnar umborð á teimum skipum, sum hava røkt farleiðina um Vestmannasund.

Tíðliga í farnu øld brutu menn úr nýggjum og sóu møguleikar í regluligum sjóvegis sambandi um sundið. Sum vit sóu í SvF, so vóru tað familjan hjá Sam og Alfredi Olsen, sum trúliga í mansaldrar røktu leiðina. Hetta varð gjørt við nærlagni. Tíverri eisini við persónligum kostnaði. Vit eiga øll at takka hesi familju fyri teirra lut í samferðsluni um Vestmannasund. Síðani SL yvirtók leiðina, hevur familjan eisini starvast á strandfaraskipunum, so tað er óivað við farra av sorgblídni, nú leiðin verður niðurløgd, at tey hjá Alfredi Olsen mugu troyta aðrar virkisleiðir

Tey, sum annars hava starvast umborð á SL-skipunum, hava verið ótroyttilig, og havi eg sum landsstýrismaður bara hoyrt gott um tykkara innsats, bæði tíðliga sum seint.

Tit kunnu vera vís í, at orsøkin til, at man er farin undir hesa verkætlan er ikki ónøgd við tykkara arbeiðið, tvørturímóti.

Nýggj tøkni verður framhaldandi ment, sum fremur broytingar. Eisini á tunnilsøkinum. Tykkara innsatsur um sundið verður seint gloymdur.

Lýta vit frameftir, eri eg ikki í iva um, at tunnilin verður ein stórur fyrimunur fyri fólkið í landinum, ikki minst fyri vágafólk.

Tunnilin fer at skapa møguleikar og fleksibilitet. Vinnulív og borgarar hvør í sínum lagi kunnu leggja sína egnu ferðaviðurskifti til rættis.

Ein avbjóðing fyri vinnulívið í Vágum, bæði tí vinnan í størri mun enn áður kann bjóða seg fram á restini av meginøkinum, og tí vinnan má vænta at fáa størri kapping.

Hetta er ein søguligur dagur. Landi og fólki at frama.

Lat okkum taka móti møguleikunum og avbjóðingunum við opnum sinni.